## Eingin Súni í Viasat-finaluni

Súni Olsen verður ikki við, tá ið AaB í kvøld skal spæla finalu í Viasat Cup. AaB hevur við sannførandi avrikum spælt seg í finaluna, sum verður ímóti FC Nordsjælland. Dysturin verður spældur á Aalborg Stadion í kvøld kl. 18.30. Súni Olsen hevur skorað tvey mál fyri AaB í hesari kappingini, men hann spældi í hvørgari av hálvfinalunum, og hann verður heldur ikki við í finaluni. Orsøkin er, at Súni hevur ein skaða at dragast við. Finalan verður send beinleiðs á TV3+ í kvøld frá kl. 17.30.



## Barcelona fiskar eftir íslendingi

Eftir at samráðingarnar hjá Barcelona við Villareal um álopsspælaran Diego Forlan eru steðgaðar, hevur Barcelona nú vent sær ímóti London, har felagið er áhuga í at keypa ein íslendskan spælara. Talan er sjálvsagt um fremsta íslendska spælaran í løtuni, Eidur Smári Gudjohnssen, sum hevur spælt fyri Chelsea seinnu árini. Sambært spanska blaðnum El Mundo skal Barcelona gjalda 85 milliónir krónur fyri Gudjohnsen, um avtalan verður veruleiki.

# Føroysk fimleikafeløg til Finnlands

**Estetisku kvinnuliðini hjá Støkk og Havnar Fimleikafelag eru farin til Finnlands at kappast um heimsmeistaraskapin í estetiskum fimleiki**

FIMLEIKUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin.fo*

Føroysku fimleikararnir fáa alsamt fleiri nýggjar og spennandi avbjóðingar. Kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag fóru í gjár og í dag fóru kvinnurnar hjá Støkk av landinum. Tær skulu allar til Finnlands at kappast um einki minni enn heimsmeistaraskapin í estetiskum fimleiki.

### Eru spentar at kappast

Rannvá Troest, venjari hjá kvinnunum hjá Støkk, heldur ikki, at vit skulu vænta okkum nakað heiðursmerki hesaferð, hóast estetisku fimleikararnir í Føroyum veruliga hava ment seg seinastu árini. – Vit eru spentar at fara avstað, og fara avgjørt at gera okkara allarbesta, sigur Rannvá, sum leggur afturat, at kvinnurnar hava vant sera nógv hesa seinastu tíðina. –Tað er jú eisini ein avbjóðing at verja føroyameistaraheitið, sum vit vunnu fyrr í ár.

Kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag hava eisini vant sera nógv og hart seinastu tíðina, og eru sera spentar at vita, um tær hesaferð klára at vinna á kvinnunum hjá Støkk. Liðini bæði eru sera jøvn, so tað kann ganga báðar vegir; dagsformurin hevur alt at siga. Í fjør kláraðu kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag seg sera væl; tá vunnu tær á fleiri liðum, hóast tær ikki lógu ovast á stigatalvuni.

Kappingin verður í Tampara í Finnlandi 9. og 10. juni. Kvinnurnar skulu fyrst kappast í einum innleiðandi umfari. Tíggju tey bestu liðini sleppa síðan í finaluna, tó í mesta lagi tvey lið frá hvørjum landi.

### Føroyskir altjóða dómarar

Við á ferðini eru eisini tær báðar Elna Johansen og Beinta Danielsen, sum eru altjóða dómarar í estetiskum fimleiki. Tær fara at døma teirra næstu altjóða kapping, sum gevur teimum atgongd at taka næsta stigið í dómaraútbúgvingini innan estetiskan fimleik.

Føroyska ferðalagið kemur aftur sunnudagin, vónandi við góðum úrslitum í viðføringum.

*Kvinnurnar hjá støkk vunnu FM-heitið fyrr í ár. Ovast f.v.: Monika W. Poulsen, Rósa Heinesen, Jónvá Joensen, Henny Joensen, Rannvá Troest (venjari) Niðast f.v.: Joan Simonsen, Ann Mari Róin Johannesen, Maibritt Olsen, Bodil Tausen*





*Kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag. F.v.: Rannvá Klein (venjari), Unn Øssursdóttir, Turið Nattestad, Beinta Svensson, Annika Abrahamsen, Jóna Johannessen, Marjun Persson og Hildigunn Niclasen*

## Tíðarsúkkling á Sundalagsstevnuni

**Á sundalagsstevnuni komandi vikuskifti verður súkklað kapp í tíðarsúkkling, ella í einkultstarti sum vit vanliga nevna tað**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Fleiri av okkara heimligu súkklarum hava víst seg at standa seg væl í tíðarsúkkling. Tá Statoil Kring Føroyar kappingin er, eru altíð einir tveir millum fimm teir fremstu. Vit kunnu nevna Rógva Johansen, Gunnar Dahl-Olsen, Boga Kristiansen og Sverra Mohr Edvinsson, sum allir hava verið sterkir í einkultstarti.

Sagt verður, at einkultstartur er tann elsta súkklugreinin og kann sigast at verða primitiv; tú velur ein tein at súkkla, so royna súkklararnir seg ein og ein, tann sum hevur stytstu tíðina um teinin, hevur vunnið. Sannleikans tími, siga danir, tí henda kapping vísir, hvør veruliga er tann sterkasti.

Samstundis sum ítróttargreinin er primitiv, er hon eisini torfør. Súkklarin skal fáa hægstu ferð á súkkluna beinanvegin og halda ferðini í til dømis ein tíma. Bein, hjarta og lungir arbeiða nærum á max., hetta er tað flestu súkklarar hava ilt við at konsentrera seg um, og tískil missa tíð í mun til teir sum elska hetta.

Størsti mótstandarin er ofta veður og vindur, tí eru súkklur, hjól, róður, hjálmar og klæði øðrvísi og meira high tech, enn tá súkklað verður vanliga kapp. Her síggja vit plátuhjól, dropahjálmar, tættsitandi klæðir osv.

Á Sundalagsstevnuni verður kapping fyri unglingar, vaksin og motiónistar. Byrjan og mál eru á landsvegnum útfyri kirkjuna í Kollafirði. Súkklast skal eftir landsvegnum norð til Ljósáir, har vent verður, síðan verður súkkla aftur til Kollafjarðar á mál. Teinurin er umleið 40 km.

Av trygdaráðum er eingin súkklukapping fyri børn.

Tað er Tórshavnar Súkklufelag, sum saman við Sundalagsstevnuni skipa fyri kappingini. Kappingin er sunnudagin 11. juni kl. 15.00. Tilmelding er á staðnum.

# TB er steypavinnari

Smádreingirnir hjá TB spældu leygardagin finalu í Cadbury steypakappingini. Finalan var ímóti B36, og TB vann 3-1. Aftan frá vinstru: Pól F. Joensen, venjari, Fróði Jensen, Magnar Vang, Jens Thomsen, Arthur Poulsen, Ólavur Sigurheim, Gilli Sørensen, Hugin Albinus og Jákup Thomasen. Húkandi frá vinstru: Jónhard Ferjá, Teitur Justinussen, Rógvi Joensen, liðskipari, Ragnar Joensen, Hjørtur Bjørgvinsson og Rógvi Sveinsson.

